GÍ-NSÍ 0-0:

# Eini grannauppgerð so líkt

**Talan var um nógvar nærdystir, til tíðir hart spæl og fáar møguleikar, vóru á skránni, tá GÍ og NSÍ hittust í Gøtu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Gøtumenninir vóru teir spælstýrandi í kontant spældu grannauppgerðini, men heldur ikki hesaferð eydnaðist teimum at fáa fult*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ikki óvæntað løgdu báðir partar nógv fyri, tá grannauppgerð var í Sarpisgerði mikukvøldið.

GÍ og NSÍ hava mangan leikt bæði javnar og spennandi dystir, og skal metast út frá hesum báðum kriteriunum, so var talan als ikki um nakað undantak.

Sum skilst, so var talan tó ikki um tað heilt stóra fótbóltsspælið frá pørtunum. Serstakliga høvdu gestirnir ilt við at fáa nakað at hanga saman, meðan gøtumenninir hinvegin royndu at trýsta spælið niðaneftir.

Málmøguleikarnir vóru tó ikki teir nógvu í tali. Eina ferð vóru vertirnir um at gerast púra leysir, og í hinum endanum stóð nógv á, tá Jónstein Petersen høgdi á tvørtræið, men meira enn tað sama gjørdist talan ikki um.

Hinvegin var dramatikkurin alla tíðina í hæddini. Ikki minst móti dystarenda, tá tvístøða millum Magna Jarnskor og Óla Hansen væl kundi borið reytt kort við sær.

### Umskipanir

Hjá gøtumonnum var talan um eitt hampuliga nógv umskipað lið. Súni Olsen var sjúkur undan dystinum, og sat tí á beinkinum, tá dómarin bríkslaði ígongd, og heldur ikki hevði tað eydnast at fáa Sámal Joensen kláran til dystin.

Tað merkti, at miðvøllurin varð mannaður við Símun Louis Jacobsen og Sam Jacobsen, men hóast nýggja samanseting, so vóru boðini úr Gøtu, at teir báðir stóðu royndina væl og virðiliga.

Eisini runavíkingar høvdu framt onkra broyting á liðnum. Serstakliga var merkisvert, at Dánjal Hansen hesaferð varð royndur á kantinum, uttan at hetta tó gav so øgiliga tyngd í hendan partin av spælinum.

### Tungur javnleikur hjá GÍ

Samanumtikið, so mundi javnleikurin eisini vera á eini leið. Men serstakliga hjá gøtumonnum mundi hesin kennast tungur. Bæði EB/Streymur og TB fingu fulla úrtøku í sínum dystum, og tí munaði javnleikurin lítið í botnstríðnum, har VB nú liðið, sum gøtumenn skulu royna at fáa aftur.

Hjá NSÍ mundi einsmalla stigið hinvegin kennast eitt sindur meira troystarfult. Serstakliga tí javnleikurin á Skála hevði við sær, at fjarstøðan til oddin ikki minkaði. Komandi vikuskiftið hevur NSÍ vitjan av Skála, og verður talan um fulla úrtøku til ta tíð, fer at síggja heilt ljóst út fyri heiðursmerkjavónunum, sum fyri bara góðari viku síðani tóktust sera kámar.

### Fakta um dystin

GÍ-NSÍ 0-0
Dómari: Lassin Isaksen
GÍ: Marcin Dawic – Hans Pauli Petersen, Robert Rzeezyeki, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Áslakur R. Petersen, Símun Loius Jacobsen, Sam Jacobsen, Poul Henning Jacobsen – Poul Arni Jacobsen, Krzystof Popczynski
GK: Hanus Jacobsen, 67., Sam Jacobsen, 75., Áslakur R. Petersen, 90.
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjálvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen, Einar Hansen – Dánjal Hansen (Jústnes H. Hansen, 83.), Jústinus R. Hansen, Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen – Ikechukwu Onyema (Andy Olsen, 57.), Christian Høgni Jacobsen
GK: Jústinus R. Hansen, 71., Óli Hansen, 88.

## Glottar at hóma

Hóast tað heldur ikki hesaferð eydnaðist GÍ at vinna, so helt Poul Arni Jacobsen, at spælið seinastu ferðirnar hevur givið teimum eina væl grundaða vón um, at tað skal bera til at koma av botnsesssinum í Formuladeildini.

– Menn kempaðu ótrúliga væl ígjøgnum allan dystin, og tí tíðir hekk spælið eisini heilt væl saman. Ikki minst vóru Sam og Símun Louis óførir á miðvøllinum, helt hann.

Og tit hildu eisini málið reint hesaferð. Er tað ikki nakað, sum styrkir sjálvsálitið?

– Heilt avgjørt. Tað hevði sera stóran týdning fyri okkum. Vit sluppu undan persónligu mistøkunum, sum hava kostað so dýrt seinastu ferðirnar, og so mugu vit royna at fáa spælið at hanga betri saman frameftir. Ikki tí, vit hava skotið hampuliga nógv mál, men sera fá av hesum eru komin úr opnum spæli, so tað er nakað, sum vit mugu arbeiða víðari við, heldur hann.

-jm

## Ikki nóg gott

Hóast javnleikurin uttan iva var til at liva við hjá runavíkingunum, so helt Jústinus R. Hansen ikki, at teir skulu vera nøgdir um spælið.

– Tað hekk snøgt sagt ikki nóg væl saman hjá okkum. Vit stóðu væl í verjupartinum, har vit hava sera gott tak á teirra álopsspælarum. Men fram eftir vøllinum skapa vit at kalla einki. Jónstein hevur eitt skot á tvørtræið, og Ike og Christian Høgni hava eisini møguleikar, men sum heild skaptu vit alt ov lítið, helt hann.

Men sum hini úrslitini lagaðu seg, so helt Jústinus kortini, at javnleikurin var til at liva við.

– Javnleikurin á Skála bar við sær, at fjarstøðan ikki øktist. Næstu ferð hava vit Skála, sum vit enn ongantíð hava mist stig ímóti, og tann statistikkin mugu vit so royna at halda fast um, segði Jústinus R. Hansen at enda.

-jm

## Eyðun á høkjum

Tíggju minuttir fyri leiklok noyddist Eyðun Klakstein hjá KÍ av vøllinum. Veteranurin, sum í ár hevur verið fastur á annars óvanda vinstra bakkinum, var offur fyri eini ógvusligari tacklingfrá Knút Vesturtún. Úrslitið var ein ferð á skaðastovuna, har tað varð staðfest, at talan er um ein liðbandsskaða.

Spurdur, hvussu leingi hann roknar við at vera burturfrá, sigur Eyðun, at talan helst verður um hampuliga drúgva tíð.

– Eg havi havt líknandi skaðar fyrr, og tá hevur talan gjarna verið um einar seks vikur, so fyribils verið eg í øllum førum ikki á vøllinum.

-jm

## Brotið armin

Millum teir spælarar, sum ikki vóru á vøllinum fyri EB/Streym í Klaksvík, var Egil á Bø.

Stinni verjuleikarin taldist annars millum málskjúttarnir, tá EB/Streymur spældi javnt móti ÍF, men eftir dystin varð hann sendir ein túr á skaðastovuna. Hann hevði nakað av pínu í arminum, og læknin kundi eftirfylgjandi staðfesta, at talan var um brot, so fyribils er armurin altso lagdur í gips.

-jm